# Óla Hvass

Eina ferð hendi tað Óla Hvass,
hann fekk ikki hønuna at liggja til pass.
    *Úti í Byrginum strýkur*
*tann skeiva langa tá,*
    *Óla Hvass fekk ikki hønuna at liggja á.*
    *Úti í Byrginum strýkur.*

2. So sendi hann boð til Niklas mín,
at hann skuldi læra seg kunstin sín.

3. Tá ið Niklas boðini fekk,
hann morgunmatarleysur av húsinum gekk.

4. Hálskragan hann í hondina tók,
tubbakspungin og rúnarbók.

5. Tá ið hann kom har niðan á Skála,
fór hann um sín vísdóm at prála:

6. "Tann høna er ikki í verðini til,
eg skal ikki fáa at liggja, sum eg vil."

7. Tá ið hann kom til Vatndalsá,
git mær, hvat hann gjørdi tá!

8. Hann fór sær í ein myrkan krók,
og hønuna hann við voldum tók.

9. Hønan á vaglinum fór at láta,
omman við grúgvuna fór at gráta.

10. "Grát ikki, grát ikki gamla kvinna,
eg skal hønuna við rúnum vinna."

11. Kvørnin hon skramblaði, eldtræið brast,
uttanduraður var Niklas í ein hast.

12. Tá royndi Niklas sín kunst upp á ný,
hann kókaði fýra og stokti trý.

13. So legði hann hana við øllum í senn,
hon legðist í fjør, og har liggur hon enn.

14. Tá ið aðrir hava váráð og velt,
tá hevur hann sær við spinnikonu spælt.

15. Spinnikonu spælt og dagdvølju loyst,
tað hevur verið hans hjartans troyst.

16. Eina ferð skeyt honum tramin tað inn,
at hann skuldi mýkja rotin skinn.

17. Skinnini mundi hann sundur ála,
harvið spilti hann so mangan dála.

18. Var hann settur til at karða,
tindarnar mundi hann sundur snara.

19. Við rokkinum var hann ei meira kringur,
tráðurin var út av lagi ringur.

20. Tá ið hann skuldi reka seyð,
tá var hann í størstu neyð.

21. Hvørja ferð seyðurin herjaði á,
so snúgvaði hann sær burtur frá.

22. Tá ið tað kom til slóttutíð,
tá fekk hann tað ringasta stríð.

23. Um hann kom á slættan hógv,
hann jørðfesti líggjan undir kjógv.

24. At berjast við kempur var hans lyst,
og dunnuna legði hann við fyrsta dyst.

25. Men tá ið gásin var óskerjað,
tá kundi hann seg ikki fyri henni verja.

26. Eina ferð úti við Káragjó,
tá bardist hann við ein kokkulárakó.

27. Tann hani seg vardi so manniliga,
Niklas hann fall á jørðina niður.

28. Men hanin so títt sínum heglum brá,
at Niklas hann opin á vali lá.

29. "Nú hjálpi mær Harrin og Santa Knút,
hann heglar mær bæði míni eygur út!"

30. So gjørdi Niklas eitt grúuligt morð:
reykin í suður og velið í norð.

31. Niklas hann rør sær so dúgliga á mið,
ongum fiski gevur hann frið.

32. Ellivu dró hann upp undir borð,
tann tólvti hann vildi gera morð.

33. Niklas hann skar í tann sjóðheita grát:
"Hetta er fiskurin, ið Jónas át!"

34. Tá ið teir fingu tann fiskin at sjá,
tá var tað onki annað enn eitt rognkelsi grá.

35. Síðani tóku teir tog av mast,
og fótalunnur í heysin brast.

36. So tók Niklas til sín knív
og skildi rognkelsið av við lív.

37. At spæla kort tað var hans lyst
við kleyvar sjeyir og hjartar tvist.

38. Men rútar níggju og spaðar fýra
og hjartarfrúgv hava hann forstýrað.

39. Í Íslandi er bæði kavi og frost,
har má Niklas standa upp á post.

40. Við ongum vøttum, foruttan hatt,
harav vinnur hann bæði æru og skatt.

41. Russland vil hann taka við vold
rætt sum ein annar Tordanskjold.

42. Eina ferð fór hann út undir Foss,
tá var hann at sjá sum eitt tonglaross.

43. Haðani gekk hann í Bakkan vestur,
hann gleivaði sum ein nýgeldur hestur.

44. So fór hann sær inn til Barald á Bakka
við skeivari tá og krókutum nakka.

Tættir III hjá Marius Johannesen.